# BØNARLØTAN

**MARS** **2025** **40. árg.**

## *1. Leygardagur* *Mark. 6.30-56*



### ONGLAND, European Christian Mission
### Dorit og Simon Marshall

Fólk í Ukraina fáa matpakkar frá samkomuni. Simon er afturkomin úr Ukraina, og nú fyrireika vit okkum til stevnuna fyri ECM-trúboðarar í apríl í Spania. Stevnan verður hildin annaðhvørt ár.

### Anna og Hans Djurhuus

Føroyskt møti verður leygard. 1. mars kl. 19 í Bethaniakirkjuni, Dag Hammerskjøldsg. 2a í Aalborg. Vit síggja nógv ung lesandi til møtini. Vit luttaka eisini á føroyskum møti í Frelsunarherinum í Esbjerg 5. mars kl. 18. Biðið fyri okkum.

**KRINGVARPIÐ**
16. og 23. mars, Sjónvarpsandakt, Pól í Skorini.
30. mars, Sjónvarpmøti, Nebo, Toftir

**EVANGELISKA RØDDIN á ras2.fo (meir á www.evr.fo)**
Sunnukv. kl. 21 Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskv. kl. 21 Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## *2. Sunnudagur* — *4. Mós. 16.23-50*



**ONGLAND,**
**Personal Support Matters**
**Claire og Craig Niclasen**
**Rebekah 17, Lydia 15**

Claire: Ráðstevnan í Ungarn gekk væl. Mær tørvar orku og vísdóm til undirvísingarskeiðið fram til 13. mars. Biðið eisini fyri luttakarunum. 17.-21. mars eri eg á ráðstevni í Niðurlondum. Biðið fyri luttakarunum og fyri Harrans leiðslu í arbeiði mínum.

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

## *3. Mánadagur* — *Mark. 7.1-23*



**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

3.-13. mars verði eg í Florida til fundir um trygd hjá trúboðarum. NTM-leiðslan í PNG hevur spurt, um vit kunnu stuðla henni einar tríggjar mán. seinni í ár. Vit gleða okkum til at vitja í Føroyum 4.-28. apríl. Biðið, at vit kenna Harrans vilja.

## *4. Týsdagur* — *4. Mós 17.1-13*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett (fjararb.)**
Stephen lærir og eggjar lesandi, ið umhugsa langtíðartænastu í trúboðan. Alsamt fleiri trúboðarar verða útihýstir úr Turkalandi. Teir fáa tá uml. 10 dagar at pakka. Biðið, at turkiska samkoman veksur og styrkist. Ramadan er nú fram til 29. mars. Biðið um, at tey søkjandi fáa dreymar og opinberingar frá Harranum henda mánaðin.

**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Josva 15, Ester 14, Samuel 10**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein, Kristina 14**
**– Danjal og Synnøve av Rana, Anna Emilie 10, Lukas 4**

## *5. Mikudagur* — *Mark. 7.24-37*



**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet**
Doulos Hope er í Keelung í Taivan til 10. mars og fer síðan til Ulsan í Suðurkorea, har hon so liggur til 1. apr. Elsa í Skorini er enn umborð á Logos Hope, sum er í Grenada til 11. mars og siglir síðani til Oranjestad í Aruba, har hon liggur til 8. apríl. Væntandi fer eitt sjakk av arbeiðsmonnum yvir eftir páskir, tá ið skipið skal í dokk. Birita

og John Timothy flyta í næstum úr Sapporo til Nanae, nakrar tímar sunnan fyri Sapporo. Óli og Frida Gregersen eru á *Reach* í Suðurafrika. *Reach UK* endaði mitt í feb., og Hjalmar Gregersen er nú heima aftur. Biðið fyri hesum og fyri tænastum teirra.

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**



Á árligu stevnuni greiddu trúboðarar frá sínum virksemi. Takk fyri bønirnar.

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

## *6. Hósdagur* — *Sálm. 37.21-40*

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**



Ráðstevnan í Tailandi um málvísindi og lesi- og skrivikunnleika gekk væl. Eg eri nú í Skotlandi fram til 21. mars. Hesa tíðina vitji eg vinir og haldi fram við umsetingararbeiðnum. Takk fyri bønir tykkara.

## *7. Fríggjadagur* — *4. Mós. 18.1-15*

**DANMARK, Kristnastova**
**Ásla og Bárður Norðberg**
**Andrea 4, Boas 2**

Regluligu tiltøkini í Kristnastovu eru fríggjakv. kl. 20: Fríggjakvøldssamkoma, og sunnumorgun kl. 11: Breyðbróting og sunnu-

dagsskúli. Eisini møtast húsbólkar annanhvønn týsd., og spælistova er annanhvønn fríggjad.

**Susan og Øssur Berghamar**



Andaktirnar á Sjúklingahotellinum geva okkum mong høvi til góð prát við fólk, ið hava ymiskar tørvir. Biðið, at vit møta teimum við kærleika Kristusar.
berghamar@kristnastova.dk

## *8. Leygardagur* *Mark. 8.1-21*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**



Biðið fyri møtum, samtalum og uppfylging, fyri STEVN og virksemi okkara í Pakistan. Tað er umráðandi, at vit gera minst ein túr til Pakistan í ár, og hetta skal fyrireikast. Upptøkur til STEVN vórðu seinkaðar tríggjar mánaðir, tí okkum vantar studio og neyðug tól til endamálið.

## *9. Sunnudagur* *4. Mós. 18.16-32*

**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 1**
Tanja fekk noktandi svar til umsóknina um visum. Hon hevur kært avgerðina og bíðar nú eftir svari. Biðið, at hon kortini sleppur til Føroya í summar.

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Lydia 8**

## *10. Mánadagur* *Mark. 8.22-38*



**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Ansa og Arnold Mortensen**
**Ewelina 15**
Ungdómsmøti eru nú hvørt fríggjakv., og fleiri leggjast aftrat. Biðið fyri teimum ungu, og at Harrin gevur okkum vísdóm og dirvi í hesum hjartamálinum.

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 14, Tabita 11, Debora 9, Natan 6**

**Atlantic Mission, Juvel II**

## *11. Týsdagur* *4. Mós. 19.1-22*




**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**
Eg gangi til dreying, og ein fittur fyrrv. tannlækni kom ein dagin við eini pappeskju við bíblium, sum hann hevði funnið, tá hann ruddaði húsini hjá mammuni. *Jeg har indtryk af, at du bevæger dig i religiøse kredse*. Jú, hann visti, at eg hevði verið við Juvel II og hevði talað til jarðarferðir. Biðið fyri honum.

## *12. Mikudagur* *Mark. 9.1-29*

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

Daniel verður allan mars mánað í Uganda. Hann skal vitja hernaðarstøðir, fongsul og øki, har trygdin er avbjóðandi. Seinast komu minst 15 til trúgv, og 12 vórðu doypt í hesum bygdunum, umframt 50 í øðrum bygdum.

*Í dag fyllir Kristina Nónstein 14 ár

## *13. Hósdagur* *Sálm. 38*

**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**



Biðið, at Harrin, sum sendi út lærisveinarnar *tveir og tveir*, *Mark. 6.7,* skal senda *tveir Timoteusar, 2. Tim. 2.2,* til verk Sítt í Suður-Grønlandi.

## *14. Fríggjadagur* *4. Mós. 20.1-29*

**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**

Fyrireikingarnar at fáa TeknBíbliuna setta á stovn í Føroyum eru í gongd. Vit verða í Skotlandi 14.-17. mars, har eg skal tala. Biðið fyri okkum og TeknBíbliuni.

## *15. Leygardagur* *Mark. 9.30-50*

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 11, Micah 11**

Í dag eru 10 ár liðin, síðan samkoman fór at møtast í hølunum her. Vit takka fyri trúfesti Harrans. Biðið um varðveitslu og vísdóm í leiðsluavgerðum.

**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**



## *16. Sunnudagur* *4. Mós. 21.1-18*

**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**



Juvel II er til 50-ára klassing. Biðið, at nokk av manning er til arbeiðið, og at vit megna at gjalda kostnaðin. Skipið skal m.a. á sleipistøð, áðrenn farast kann til Grønlands. Enn manglar nakað av manning til túrin, sum byrjar 21. mai.

**FØROYAR**
**– Birgit og Svenning av Lofti**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Vanja og Svein í Prestgarði, Terji 12, Petra 11**
**– Birita og Petur á Roykheyggi**



*Í dag fyllir Lydia Berghamar 8 ár
*Í dag fyllir Evita Tuohy 10 ár

## *17. Mánadagur* *Mark. 10.1-22*



**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Emma Grace 17, Jónatan 15, Markus 12, Evita 10, Joy 8**

Biðið fyri likamligu og sálarligu heilsuni hjá systur okkara Rosi. Hon hevur ábyrgd av trimum sinnisveikum systkjum. Sjálv er hon illa fyri og situr í koyristóli. Vit verða í Føroyum frá apríl til juli, um Harrin vil.

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## *18. Týsdagur* *4. Mós. 21.19-35*

**Mission Aviation Fellowship, MAF Føroyar**
**Andrias Hansen - Trúboðaraflogskipari við MAF**

Enroute-skeiðið á All Nations Christian College í Onglandi er nú hálvrunnið. Skeiðið fyrireikar meg til trúboðaraarbeiði í ymiskum londum og mentanum. Tað hevur verið sera læruríkt. 18. mars skal eg hava eina týðandi samrøðu við MAF International fyri at avgera, nær og hvussu eg kann tæna. Biðið fyri hesum. Síðst í mars komi eg heim í tvær vikur, áðrenn eg fari aftur til Niðurlond sum floglærari.

## *19. Mikudagur* *Mark. 10.23-52*

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

Biðið fyri summarlegum við Ástjørn, at nógv børn vilja luttaka, og at Gud sendir starvsfólk, sum elska verkið. Okkum tørvar vísdóm umframt ymiska ítøkiliga hjálp til legurnar.

## *20. Hósdagur* *Sálm. 39*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 7, Timon 5, Manuel 1, Salome 1**

Í samstarvi við lesi- og skriviráðgevum gjørdu vit uppskot til grundarlag fyri skeiðnum og einum hefti. Enn er langt á mál, men vónandi undirvísa vit í fyrsta skeiðnum í summar. Biðið fyri okkum, sum vit menna hesa útbúgving.

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 4, Selah Rose 2**

Í Asmat er ótrygt hjá okkum í løtuni, so í staðin hjálpa vit á visa-skrivstovuni hjá NTM í Papua. Biðið, at Gud leiðir okkum at virka fyri seg í Asmat ella aðrastaðni.

## *21. Fríggjadagur* *4. Mós. 22.1-20*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

Ein drongur læt seg doypa sunnudagin, og tvey onnur blaðung

hava biðið um dóp. Harrin signi hesi ungu, sum hava valt at fylgja Jesusi.



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 14, Leah 11, Abigail 6**

*Í dag fyllir Trisha Guttesen 13 ár

## *22. Leygardagur* — *Mark. 11.1-33*



**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**

Fam. 29. juni - 5. juli: ok. Børn 7.-11. juli og 14.-18. juli: tørvur 5 lið- og 5 hjálparleiðarar, 3 til køk, 2-5 til uppvask, reingerð o.a. á hvørjari legu. Fam. 20.-26. juli: tørvur 3 til køk. Ung 28. juli-1. aug.: tørvur 5 lið- og 5 hjálparleiðarar, 3 til køk, 2-5 til uppvask, reingerð o.a. Outreach í Nuuk 4.-6. aug.: tørvur min. 5 hjálparar. Ragnhild +299 486448

## *23. Sunnudagur* — *4. Mós. 22.21-41*

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Vit fara til Filipsoyggjar síðst í mars. Cathy fær viðgerð fyri knæskaða, ið hon fekk stutt eftir nýggjár. Biðið, at knæið verður frískt, áðrenn vit skulu avstað.

## 24. Mánadagur — Mark. 12.1-17

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**



Árliga missiónsstevnan *Reach* verður 28.-30. mars her á skúlanum hjá NTM. Vit vænta, at eini 200 ung millum 18 og 30 ár vitja stevnuna, har trúboðarar greiða frá arbeiði hjá NTM kring allan heimin. Biðið, at tey ungu verða eggjað at gera Harrans verk. Poul undirvísir nú um bíbliuumseting.

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 8, Jude 6, Evelyn 4, Olivia 1**

Trúboðaraleiðslan hevur biðið okkum og tvær samverkafamiljur brúka 4-6 mánaðir at vitja samkomur, ið felagsskapur okkara hevur sett á stovn á oyggjunum New Britain og New Ireland. Vit vilja brúka tíð saman við samkomunum og hoyra, hvat ið teimum tørvar, so vit kunnu stuðla teimum á bestan hátt. Biðið fyri varðveitslu á ferðunum, og at vit verða til signing og hjálp.



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 16, Noah 15, Karis 11, Judah 9, Ethan 6**

## 25. Týsdagur — 4. Mós. 23.1-30

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Eftirkanningin av 1. Sám. og fyrstu 12 kap. av 2. Sám. gekk væl. Síðani skal rættlesast og setast upp til prent.
Lítla gentan, eg nevndi seinast, hevði blóðkrabba og kundi ikki hjálpast. Hon fór heim til Jesus 22. feb. Biðið fyri familjuni. Orð Guds talar til pápan, og mamman hevur júst átt tvíburar.

## *26. Mikudagur* *Mark. 12.18-44*



**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 13, Emma 8**
Í La Fonte samkomuni eru nú útlendingar úr 13 ymsum londum. Seinnu árini eru fleiri tilflytarar komnir úr Suðuramerika, og teir eru stór hjálp í verkinum.

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 15**

## *27. Hósdagur* *Sálm. 40*

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 13**
Fleiri týskum trúboðarafamiljum tørvar ungar menn at vera heimalærarar hjá synum sínum komandi skúlaár. Tað er ein stór hjálp í arbeiðnum. Benjamin hevur úr at gera á skrivstovuni. Tað gongur væl við lítla fosturbarninum. Takk fyri bønir tykkara.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## 28. Fríggjadagur 4. Mós. 24.1-25



**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

Tað var signað at vitja norðuri í bygdini Lenga, har vit virkaðu frá 1981 til 1992. Fýra ung fólk í samkomuni vilja verða doypt. Vit hoyrdu fleiri trúgvandi siga søgur úr Bíbliuni frá skapanini, og til Jesus fór aftur til himmals. Hetta varð gjørt uttan at opna Bíbliuna og uttan notat. Jesus segði: *Eg skal byggja samkomu Mína*, og tað ger Hann. Tað er signað at vera við í hesum stóra verki! Liz hevur tað betri nú – takk fyri trúføstu bønir tykkara.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 16**

*Í dag fyllir Lydia Niclasen 15 ár

## 29. Leygardagur Mark. 13.1-37

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 13, Noah Kristian 11**

Vit skulu nú saman við The Well International seta lyklastarvsfólk, m.a. í leiðslu og fyrisiting. Biðið fyri hesi tilgongdini.

## 30. Sunnudagur 4. Mós. 25.1-18

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 15, Nana 13, Louie 11, Rio 5**

Biðið fyri ungdómsarbeiðnum í samkomuni. Vit fara undir eitt tiltak ætlað ungum, serliga vinfólki hjá Kano og Nanu. Hetta skal vera eitt rúm, har tey ungu kunnu koma saman og hoyra um Gud í sangi og bíbliuversum.

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope.













FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo

Útgevari KBS (Kristniboðssambandið)
Blaðnevnd Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang.
Avgreiðsla Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
Uppseting Grafikmaster, tel. 502022
Myndasavn info@grafikmaster.fo
Prent Føroyaprent, tel. 314555
Teldupostur prayerservicefo@gmail.com
Heimasíða www.kbs.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

# Tørvur á lærarum!











**Sørin Joensen:** Grace International School í Chiang Mai, Tailandi, er skúli fyri børn hjá trúboðarum, sum virka í Asia. Á skúlanum eru yvir 500 næmingar úr 40 londum og 100 sjálvbodnir lærarar. Skúlin hevur frálíkar nýggjar umstøður og er frá barnaskúla til miðnám.

Tørvur er á lærarum og hjálparfólki til allar árgangir. Eisini er møguligt hjá læraralesandi at fáa lestrartíð og góðkenda praktikktíð á skúlanum.

**Meira fæst at vita við at ringja til Hall Thomsen á tel. 228060.**